krabbameinsfelagið

Tórshavn 16. apríl 2010

**Nýtt tilboð til krabbameinssjúklingar**

Tórshavnar Kommuna samstarvar við Krabbameinsfelagið og Havnar Svimjifelag, ið eru farin undir at fyrireika eitt nýtt rørslutilboð. Talan er um eitt svimjiskeið á Eysturskúlanum. Skeiðið verður fyri fólk, ið hava ella hava havt krabbamein. Eftir ætlan byrjar svimjuskeiðið fyri summarfrítíðina.

Tað er vísindaliga prógvað, at rørsla økir mótstøðuførið móti sjúkum og at krabbameinssjúklingar, sum íðka ítrótt og røra seg nógv, hava betri lívsgóðsku og størri møguleika at liva longri.

v/ Krabbameinsfelagið
Jákup N. Olsen, formaður

V/ Havnar Svimjifelag
Sigurd L. Lamhauge, formaður

Grønlandsvegur 58
Postboks 1216
110 Tórshavn
Tel. +298 31 79 59
www.krabbamein.fo

The Faroese Cancer Society